# Kjak

## Studni – nýggja navnið á Stuðulsstovninum

Tíðindaskriv
Studni

Tá ið Stuðulsstovnurin varð settur á stovn í 1988, varð fyrst og fremst hugsað um peningaligan stuðul, tá ið orðið "stuðul" varð nevnt, t. d. stuðul til fiskivinnuna ella lestrarstuðul. Í dag hevur "stuðul" ofta merkingina: at stuðla menningartarnaðum ella fólki við sálarligum ella likamligum breki. Tað er ikki so sjáldan, at starvsfólkini á Stuðulsstovninum møta hesi uppfatan, tá ið tey siga, at tey arbeiða á Stuðulsstovninum. Hetta er ein av orsøkunum til navnabroytingina.

Ein onnur orsøk til at broyta navnið er, at Stuðulsstovnurin ofta verður blandaður saman við aðrar stovnar. Talan er altíð um stovnar, ið taka sær av fólki við breki. T.d. hevur Stuðulsstovnurin ofta verið blandaður saman við Sernámsdepilin, og fólk hugsa ofta eisini um Stuðulstænastuna hjá Nærverkinum og Stuðulsfólkaskipanina hjá Almannastovuni, tá ið tosað verður um Stuðulsstovnin. Aðrir líknandi stovnar eru Stuðulsstovan og Stuðulstoymið.

### Hví Studni?

Grundgevingarnar fyri at velja orðið Studni sum nýtt navn eru fleiri:

- Studni er gamalt føroyskt orð, ið ikki verður nýtt longur. Studni er óbundið kallkynsorð, ið bendist *studni, studna, studna, studna*. Orðið merkir sambært móðurmálsorðabókini *kjølfesti*, og dømini, sum verða nevnd eru: "legg ein studna í bátin (t.d. ein stein)", og "báturin hevði fingið ein studna av fiskinum". Sagnorðið "at studna" merkir at styðja, og dømini, ið verða nevnd her, eru: "eg ætli mær at studna hann tað, eg kann", og "báturin var væl studnaður (væl av fiski í honum, kjølfestur)". Kallkynsorðið "studnaður" merkir *stuðul, styrkur, studni* og *hjálp*. Dømið, ið verður nevnt í hesum førinum er: "vit skulu bera okkum studnað í bátin, áðrenn vit fara".
- Studni er snøgt, stutt orð, ið bert hevur altjóða bókstavir. Hetta ger, at heimasíðan og eftirnavnið í teldupostadressum verður tað sama sum í navninum.
- Studni skapar hugasamband (associatiónir) til orð sum *studning, stuðul, student* og *at studera*. Harafturat er nógv myndamál í hesum, sum er sagt, serliga tað at kjølfesta tey ungu, at geva teimum eina barlast fyri lívið við at geva teimum fíggjarligan stuðul og harvið møguleikan at fáa eina útbúgving.
- Sum nevnt omanfyri, er Studni lætt at benda, og tað fer kanska at styrkja bendingarkensluna hjá teimum ungu, sum fyrst og fremst vera tey, ið hava samband við Studna.

Hugskotið til navnið eigur John Dalsgarð. Í samband við navnaskiftið hevur Studni fingið nýggja heimasíðu www.studni.fo



Sjúrður Skaale

# Jørgen Niclasen: Ráðharri og redaktørur

*Jørgensa roynd at keypa og stýra pressuni er eitt sjúkutekin í okkara politisku skipan. Fær tað ongar avleiðingar, er eisini tað eitt sjúkutekin*

»Hvíta bókin« hjá Einari Már Guðmundsson er ikki bara eitt lemjandi ákærurit móti teirri Íslendsku yvirstættini, hvørs perversi grammleiki koyrdi landsins búskap í knas.

Bókin er eisini eitt slag av læknabók hjá okkum í Føroyum. Tí áðrenn Ísland legðist á songina, vóru nógv sjúkutekin at síggja. Og eru vit tilvitað um hesi sjúkutekin, kunnu vit, meðan tíð er, fyribyrgja at vit enda í somu støðu.

Tað mest álvarsama sjúkutekini, sum er líka sterkt í Føroyum sum tað var í Íslandi, er, at veljararnir ikki vita, hvat teir fáa fyri atkvøðuna. Nærum øll vallyfti í Føroyum eru følsk marknaðarføring. Politiska skipanin livir sítt egna lív, og veljarin hevur næstan onga ávirkan á nakað.

Vónandi hevur tann nevnd, ið skal endurskoða vallógina, onkran munadyggan heilivág móti hesum.

### Pressan

Eitt annað sjúkutekin í Íslandi var, at fíggjarvaldið og politiska valdið keyptu sær ræði á pressuni.

Már Guðmundsson skrivar m.a.: »Fjølmiðlarnar løgdu tey pengasterku undir seg, almenna kringvarpið undantikið, men tað høvdu høgrasinnaðir politikkarar í hondum, tíðindatænastan mangan lítið meir enn eitt ilt av eini deild hjá hesum kreftum.«

Eitt púra fræls pressa er avgerandi fyri, at fólkaræði kann fungera.

Tí tók eg tað upp, tá Dimma avdúkaði, at Jørgen Niclasen, við almennum pengum, hevði keypt sær umrøðu í Kringvarpinum.

Jørgen hevur nú svarað mínum spurningum. Og svarið sýnir ein hugburð, sum er ófrættakendur.

### Redaktiónsleiðarin

Royn einaferð, kæri lesari, at hugsa tær, at tað er redaktørurin á Degi & Viku, sum sigur hetta:

»Tískil varð mett, at tað var viðkomandi at geva Føroya fólki sum heild innlit í, hvat arbeiðið fyri granskingarsáttmálan snýr seg um, og hvussu ein slík undirritan fer fram. Eisini var tað mett viðkomandi at geva eina ítøkiliga mynd av, hvussu samstarvið við ES fer fram.«

Hugsa tær at redaktørurin heldur fram:

»Við at geva fjølmiðli møguleika at koma við til Brússel, var møguleiki hjá Kringvarpinum at fáa sjónarmiðini hjá ES við og tosa við viðkomandi fólk úr ES kervinum. Hetta var mett at lata upp fyri møguleikanum eisini at nýta ES kervið sum beinleiðis keldu, sum kundi viðføra ein breiðari tíðindaflutning um granskingarsáttmálan, tí onnur sjónarmið enn tey hjá Uttanríkisráðnum kundu verða drigin við í tíðindaflutningin.«

Hetta gevur avgjørt meining. Hetta er logiskt. Um tað altso er ein redaktørur, sum sigur tað.

Síðani skuldi redaktørurin eisini gjørt av, hvør journalistur var best skikkaður at lýsa umrødda mál, og givið viðkomandi uppgávuna.

### Jørgen

Trupulleikin – tann sera stóri trupulleikin – er, at tann, sum ger hesa journalistisku meting av málsøkinum hjá Jørgen Niclasen er ... Jørgen Niclasen!

Og tað er verri enn! Jørgen hevur eisini, við almennum pengum, rindað fyri, at hansara hugsan um journalistiskar raðfestingar kann fremjast í verki!

Og tað er verri enn! Jørgen hevur eisini gjørt av, júst hvør journalistur skal hava uppgávuna! Allar tær metingar, sum redaktørurin skuldi gjørt, hevur Jørgen altso gjørt.

Var einaræði í Føroyum, hevði hetta verið natúrligt. Men í einum fólkaræði er tað eitt sjúkutekin.

Og tað er verri enn! Tí í svarinum til mín dugir Jørgen als ikki at síggja, at hann hevur gjørt nakað galið...

### Politiskt stýrd tíðindi

Og tað er verri enn!

Tí Jørgen Niclasen er formaður í einum politiskum flokki, sum ikki vil hoyra talan um, at Kringvarpið fær rúmari ræsur at gera sjálvstøðugar, redaktionellar raðfestingar.

Jørgen gongur eina aðra leið: Tað, sum Jørgen heldur skal raðfestast – tað rindar hann beinleiðis fyri við almennum pengum!

Um hetta ikki fær onkrar avleiðingar, so kunnu vit bara hugsa okkum, hvat tað næsta verður:

Annika Olsen kann rinda journalistum fyri at lýsa hennara royndir at fremja kommunusamanlegging.

Helena Dam á Neystabø kann rinda fyri innsløg um hennara skúlareform.

Jóannes Eidesgaard kann keypa innsløg um arbeiðið at gera fíggjarlóg.

Tað, sum Jørgen hevur gjørt, kann tykjast sum eitt lítið mál. Men tann fyrsti krabbaknykilin í kroppinum er eisini lítil!

Hetta er eitt sjúkutekin, sum skal takast í álvara. Verður tað ikki steðga, enda vit sum eitt annað Cuba.

### Onnur dømi

Fólk hava sagt, at Jørgen ikki er tann fyrsti, sum keypir sær umrøðu. Fari eg víðari við hesum, siga tey, verður ljóskastarin bara settur á onnur mál. Kanska mál hjá onkrum tjóðveldisfólki.

Tað er rætt. Tað finnast helst dømi, sum minna um hetta.

Men júst henda hugsan er eisini eitt sjúkutekin.

Ein vandi í politikki er, at nógv hava beinagrindir í skápinum – ella kenna onkran, sum hevur. Og í staðin fyri at gera vart við rotinskap, verður endamálið tá at fjala útyvir rotinskap.

Ein »professionellur loyalitetur« vinnur fram, sum byggir á henda logikk: »Sigi eg hetta um hann, so sigur hann nokk eisini hitt um meg. Men tigi eg við hesum, so tigur hann nokk eisini við hinum«.

Jørgen hevur uttan iva okkurt at »skjóta aftur við«. Men óttast vit hetta, verður endin, at øll velja at tiga um alt.

### Ósamsvar

Ein onnur, meira ítøkilig orsøk til at eg fari víðari við hesum er, at ósamsvar er millum tað, sum Jørgen Niclasen sigur í sínum svari til mín fríggjadagin, og tað, sum Miðlahúsið sigur um ferðina til Washington.

Í svarinum sigur uttanríkisráðharrin at »í sambandi við arbeiðsferðina hjá uttanríkisráðharranum til Washington var óformlig samrøða við Rás 2 um møguligar at hava tíðindafólk við á ferðini.«

Men sambært Miðlahúsinum var tað ein útvaldur journalistur á Rás2, sum, persónliga, fekk tilboð um at fara við Jørgeni til Washington.

Tí havi eg spurt Jørgen Niclasen nærri um hetta, eins og um tær juridisku heimildirnar fyri hansara samstarvi við journalistar.